Ávirkan frá oljuvinnu kannast

Fró›skaparsetri› og bretska felagi› Menas skulu gera eina umfatandi kanning av ávirkan, sum komandi oljuvinnan fer at fáa á føroyska samfelagi›. Bretska oljufelagi› BP Amoco fíggjar ætlanina

JAN MÜLLER

Søgu- og samfelagsdeildin vi› Fró›skaparsetur Føroya er komin upp í eina umfatandi kanning av ávirkanum, sum oljuvinnutilgongdin hevur á føroyskan búskap, samfelag, mentan og umhvørvi.

Eftir at oljuleitingarloyvini á føroyskum øki eru latin hevur BP Amoco Exploration (Faroes) Limited gjørt avtalu vi› Menas Associates Limited og Fró›skaparsetur Føroya um at gera eina óhefta kanning. Kanningin er skipa› sum ein vísindalig granskingarverkætlan og er ætla øllum áhuga›um, i› vilja leita sær rá› um føroyska oljuvinnu.

Nakrir av teimum, sum eru vi› til at gera kanningina. Umframt Suna á Dallbø og Svein Tummasarsson eru eisini tríggir av bretunum, John Christensen, Kevin Collins og J. P. Wagner.

Mynd jan

Kanningin byggir á undanfarnar kanningar í sambandi vi› uppbyggingina av einum føroyskum oljuídna›i, sum t.d. Frágrei›ingin hjá Oljurá›leggingarnevndini frá 1998. Kanningin er skipa›, so hon tryggjar luttøkuna hjá einum ví›um skara úr føroyska samfelagnum. Opi› ver›ur fyri íkasti frá almenninginum, a›alst‡rum landst‡rins, vinnulívsfólki og umbo›um hjá vinnuni, feløgum og umbo›um hjá bygdum og b‡um og feløgum annars, i› umbo›a lokal áhugamál.

Li›i› av granskarum fevnir um serfrø›ingar av ymsum slag frá eini rø› av ymsum stovnum, herímillum Centre for the Economics and Management of Aquatic Resources vi› the University of Portsmouth, England, and the Environment and Society Research Unit vi› University College, London. Harafturat vil kanningin ver›a dugna› vi› rá›um av granskarum frá Fró›skaparsetri Føroya, the London School of Economics and Political Sciences og the Queen´s University í Belfast.

Kanningin ver›ur stjórna› og samskipa› av John Christensen, sum er lei›andi rá›gevi innan búskap og stjóri á Menas Associated Limited og av Suna á Dalbø, i› er granskari kn‡ttur at Søgu- og samfelagsdeildini vi› Fró›skaparsetri›. Nærri uppl‡singar um luttakararnar í kanningini er heftar vi›.

Menas

Menas Associated Limited er eitt óheft bretskt rá›gevavirki, sum veitir stjórnum og vinnu serkøna rá›geving. Menas erført fyri at draga nyttu burtur úr einum fjølbroyttum serkunnleika á nógvum økjum og í nógvum londum gjøgnum síni sambond vi› lærdar háskúlar og granskingarstovnar kring allan heim. Sí›ani 1978 hevur Menas veitt serkunnleika og serfrø›ingará›geving til eitt stórt tal av oljufeløgum og ø›rum feløgum, sum takast vi› at veita orku. Somulei›is hevur Menas givi› fleiri stjórnum rá›, serliga vi›víkjandi búskapi, politikki og umhvørvi.

Umframt teir bá›ar rá›gevarar eru eisini a›rir persónar vi› í kanningarætlanini. Teir eru Jay Wagner, Sveinur Tummasson, Dennis Holm, Kevin Collins, Bjarni Mortensen, George Joffé, Jógvan Mørkøre og Stephen Royle. Haraftrat ver›a eisini a›rir vi› í projektinum.

Tey, sum vilja vita meira um bretska felagi›, kunnu leita inni á www.menas.co.-uk. Somulei›is fæst eisini meira at vita um Fró›skaparsetri› á www.sleipnir.fo-/setur

Suni á Dalbø og John Christensen, i› koma at stjórna og samskipa kanningina.

Mynd Jens K. Vang

Orðaskifti:

Havt út við 100 mió. kr. í avlopi av sjúkraviðgerð á Ríkissjúkrahúsinum

Samstundis sum fullveldisfólk upp í saman pástanda, at vit sjálvi gjalda fyri sjúkraviðgerð á Ríkissjúkrahúsinum, er veruleikin tann, at vit í tíðarskeiðnum 1988-99 hava havt eitt avlop upp á 93 mió. kr. av hesi viðgerð.

Tá ið gamla refusiónsskipanin í 1988 bleiv umløgd til ein blokkstuðul, bleiv blokkurin latin føroyingum sjálvum at umsita, soleiðis at skilja, at vit kundu nýta upphæddina í blokkinum, sum vit vildu og til annað, enn hann var ætlaður til. Soleiðis kundu vit t.d. nýta tann pening, sum var ætlaður til sjúkraviðgerð á Ríkissjúkrahúsinum, til eitt nú vegir og tunnellir ella hvat tað nú kundi vera.

5% ætlað til Ríkissjúkrahúsið

Men grundarlagið, blokkurin bleiv útroknaður eftir, var gamla refusiónsskipanin. Sambært upplýsingum frá Ríkisumboðnum var refusiónin til sjúkraviðgerð á Ríkissjúkrahúsinum uml. 5% av samlaðu refusiónsupphæddini. Síðan blokkurin kom í gildi, er hann stórt sæð bert prístalsviðgjørdur. Verandi samgonga hevur t.d. samráðst við donsku stjórnina um at hækka samlaðu veitingina. Men grundarlagið er ongantíð broytt.

Tí er tað rætt at nýta hesi somu 5%'ini, tá ið metast skal um, hvussu nógv vit fáa frá dønum til sjúkraviðgerð uttanlanda, og tá einamest á Ríkissjúkrahúsinum.

Avlop upp á 93 mió.

Sambært upplýsingum frá Fíggjarmálastýrinum hava upphæddirnar verið hesar í mió. kr.:

Soleiðis hava vit í veruleikanum, síðan vit fingu blokkin, fingið 93 mió. kr. meiri til sjúkraviðgerð á Ríkissjúkrahúsinum, enn vit hava brúkt.

Grundað á skeivar fortreytir

Hetta er bert eitt av nógvum dømum um, hvussu fullveldislandsstýrið við skeivum upplýsingum roynir at fáa føroyingar at taka undir við vitleysu fullveldisætlani

Johan Petersen

	1988	1989	1990	1991	1992	1993	1994	1995	1996	1997	1998	1999
Blokkur	480	516	752	784	789	814	817	852	860	886	908	933
Ætlað Ríkissjúkrah.	24	26	38	39	39	41	41	43	43	44	45	47
Nýtt til Ríkissjúkrah.	22	23	24	26	27	32	34	33	34	35	37	50
Avlop	2	3	14	13	12	9	7	10	9	9	8	-3
Samlað avlop frá blokkinum av útreiðslum, ætlaðar til viðger_ á Ríkissjúkrahúsinum												93

Viðmerking til grein á forsíðuni í Oyggjatíðindum fríggjadagin farna

Trivnaðarnevdin varð á almennari vitjan í Íslandi í døgunum 15. til 20. september. Endamálið við ferðini var at kunna okkum um íslendsk viðurskifti innan almanna- og heilsuverk. Trivnaðarnevndin hevði 13 almennar vitjanir á ferðini, og allir limir nevndarinnar møttu væl fyrireikaðir til allar vitjanir. Frágreiðing frá ferðini sæst á www.logting.fo komandi.

Eisini atburður trivnaðarnevndarinnar aftur og fram á ferðini var fyrimyndarligur. Væl lærd av verri royndum hjá undanfarnum politikarum á uttanlandsferð var eitt av aðalmálunum á ferðini at tryggja ein fyrimyndarligan atburð. Hetta metir formaðurin eydaðist til fulnar.

Við á ferðini vóru: Marjus Dam, Hans Pauli Strøm, Kristian Magnussen, Rúna Sivertsen, Jóanis Nielsen, Finnur Helmsdal og Páll á Reynatúgvu.

Virðingamest
Páll á Reynatúgvu,
formaður
trivnaðarnevndarinnar

Fortíð og nútíð

Eg var so heppin at sleppa at síggja spennið sum tey dugnaligu fólkini frá Føroya Forminnissavni júst hava funnið heima á Sandi. Tú fær eina løgna kenslu av at standa við hesum sjáldsama prýðinum, sum uttan iva hevur glett eina vakra gentu á Sandi fyri 1000 árum síðani. Lætt er at gloyma seg burtur seg í dagdreymum, men vit skulu ikki gloyma at hetta gamla víkingaprýði hevur ein boðskap til okkum, nevniliga samskiftið við umheimin og aðrar mentanir, maður er mans gaman.

Víkingaspennið, sum kanska er gjørt í Ruslandi og síðani komið til Føroyar er enn eitt prógv um at Føroyar kanska eru fjarskotnar men hava ongantíð verið avbyrgdar ella gloymdar. Soleingi fólk hevur búleikast her hevur verið samband við umheimin. Hetta er líka týdningarmikið ídag sum áður »No man is an island« sum bretska skaldið tók til.

Sitandi býráð hevur gjørt góðar konstruktivar avtalur um samvinnu við grannabýir í Noreg og Skotlandi. Hesar avtalur fara at økja samstarvið á fleiri økjum sum td oljuvinnu og ferðamannavinnu. Uttan iva fara granskingarætlanir av ymsum slagi eisini at spyrjast burturúr umframt at tær stuðla tað vinnuliga samstarv sum longu er við hesar okkara næstu grannar.

Tað er at vóna, at okkara ungdómar fara at nema sær hægri lestur í hesum londum, og eigur Býráðið at kanna, hvussu hetta kann stuðlast.

Sum eftirkomarar víkingana eigur komandi Býráð eisini at fara víðari og fáa samstarv við aðrar býir í Evropu og í øðrum heimspørtum. Hetta vil stimbra okkara mentan og verða ein stuðul hjá okkara vinnulívið.



Tá vit tosa um Forminnissavnið má nevnast teirra frálíka framsýningarhøll sum er eitt prýði fyri Tórshavn, og sum á hvørjum sumri hevur hópin av vitjandi fremmindafólki.

Tíðanverri vita vit ikki so nógv um okkara víkingaøld, men nógva staðni í Føroyum veit Forminnissavnið um áhugaverdar fornleivdir. Verða hesar grivnar út, kunnu tær geva okkum sera týdningarmikla vitan.

Spennið á Sandi er bert eitt lítið dømi um, hvat goymir seg undir flagnum.

Arbeiðið hjá Føroya Fornminnissavni hevur alstóran stóran týdning fyri Føroyar og fyri okkara samleika sum tjóð. Tað er sjálvsagt, at hesin stovnur skal hava rúmligar fíggjarliga ræsur at virka undir soleiðis, at okkara fornminnir ikki fara fyri skeyti, men verða varðveidd fyri framtíðina og okkara eftirkomarar.

Alltjóða heimurin hevur sera stóran áhuga fyri víkingunum. Ein útgrivin víkingabygd heima á Sandi vil hava sera stóran týdning fyri okkara ferðamannavinnuna og tann akademiska áhugan fyri Føroyum yvirhøvur

Johan Mortensen
Valevni til Býráðsvalið
í Torshavn
fyri Tjóðveldisflokkin

Kommunur fingið tilboð um brævalán

***Tíðindaskriv:** Landsbankin hevur saman við Norðoya Sparikassa og Unibank sent kommunum, sum hava ein tørv, tilboð um brævalán til umfígging av verandi skuld.*

Eitt felag FKI A/S, sum verður stovnað til endamálið, keypir lánsbrøvini frá føroyskum kommunum, sum taka av tilboðnum. Keypið av hesum lánsbrøvunum verður fíggjað við at geva út og selja lánsbrøv á marknaðinum, fyrst og fremst í Føroyum, men eisini í útlondum um neyðugt. Trygdin hjá íleggjarunum, sum keypa lánsbrøv frá FKI er fyrst og fremst lánsbrøvini, sum kommunurnar geva út. Harumframt veitir Kommunali veðhaldsgrunnurin gjaldføristrygd til FKI-lánsbrøvini og sostatt íleggjararnar. Fyri at tryggja ognirnar hjá kommununum í veðhaldsgrunninum, veita kommunurnar transport í skattainntøkunum. Lánið gongur yvir 5 ár. Tey fyrstu fýra árini er ein avdráttur sum er 10% av høvuðsstólinum, og tað fimta árið fellur restin til gjaldingar. Kommunurnar hava fingið freist til 25. September 2000 at svara, hvørt tær taka av tilboðnum ella ikki.

Tað stendur kommununum frítt at taka av ella at vraka tilboðið. Løgtingslógin um kommunala veðhaldsgrunnin heimilar grunninum at veita trygd fyri lánum í eini felags loysn, men ásetir eisini at tær kommunur, sum velja at vera uttanfyri eina felags loysn kunnu fáa helvtina av sínum ágóða útgoldnan tann 1. Desember 2000. Restin kann setast sum trygd fyri eini felags loysn. Tá 5 ár eru farin tvs 1. Desember 2005 ásetir lógin at grunnurin verður avtikin og ágóðin skal útgjaldast kommununum.

Hetta er ein heilt vanlig fígging fyri marknaðarkor, sum er kend aðrastaðir. Hetta er ein týðandi orsøk til, at landsbankin, Norðoya Sparikassi og Unibank taka stig til hesa fígging. FKI-lánsbrøvini høvdu verið væl egnað at givið út og selt á einum føroyskum virðisbrævamarknaði. Til fíggingartørv hjá kommunum um fimm ár ber hetta væl til. Tað hevur eisini týdning.

Tað er eingin ivi um, at tilboðið er gott, hvat rentusømdum viðvíkur. Tað vilja helst allar kommunur viðganga. Tilboðið kann geva nøkrum kommunum, sum hava stóra skuld trongligt gjaldføri, tí at avdráttirnir eru lutfalsliga stórir. Fimta árið skulu flestu kommunur upptaka nýggj lán til at endurfíggja restskuldina, men tá eru allar kommunur, sum velja hesa loysnina, væl fyri og fáa ikki trupulleikar við hesum.

Nakrar kommunur, sum vísa tilboðnum frá sær, tí at avdrátturin er ov stórur, vera í stórum vanda fyri at fáa so vánaligar rentusømdir aðrastaðni, at tær eftir bert fáum árum kunnu fara at rinda líka nógv í rentum, sum tær skulu rinda til rentur og avdráttir í hesum tilboðnum.

Flest allar kommunur hava ynskt at fáa eitt tilboð. Tórshavnar kommuna hevur sagt seg vera glaða fyri hetta tilboðið, men hon hevur ikki biðið um at fáa tað. Í hesum førinum er tilboðið sent fíggjarnevndarlimum, fyri at tryggja at tilboðið verður kent í býráðnum.